Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	29. sept. 2023
Mál nr.:	23/18898-1
Málsviðgjørt:	HP
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	24.09.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av almannaveitingum
(Hækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd fyri fólkapensjónistar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 12. desember 2020, verður § 3, nr. 1, 20. rað orðað soleiðis:
“

Frádráttarfrí inntøkuupphædd fyri fólka-pensjónistar	2024	61.900,00

”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjalding av veitingum frá og við januar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Politiska ynskið er, at fólkapensjónistar, sum hava inntøkur aftrat fólkapensjón og útgjald frá Samhaldsfasta, skulu hava betri fíggjarligar umstøður. Við at hækka frádráttarfríu inntøkuupphæddina fer meginparturin av fólkapensjónistunum, sum hava inntøkur aftrat fólkapensjón og útgjald frá Samhaldsfasta, ið er hægri enn 45.000 kr. um árið, at fáa hægri fólkapensjón.

1.2. Galdandi lóggáva

Í Føroyum eru tvær pensjónsskipanir – ávikavist til persónar føddir áðrenn og aftaná 1. januar 1953. Eftir hetta verða skipanirnar nevndar gamla pensjónsskipanin og nýggja pensjónsskipanin. Fyri báðar pensjónsskipanirnar er galdandi, at tey, sum hava høga inntøku, fáa lægri fólkapensjón enn tey, sum hava lága inntøku. Almannaverkið roknar eitt inntøkugrundarlag hjá hvørjum einstøkum fólkapensjónisti, og við støði í inntøkugrundarlagnum verður fólkapensjónin roknað. Inntøkugrundarlagið er ein árlig upphædd og er sett saman av arbeiðsinntøku og privatari pensjón (tó ikki kapitalpensjón), men eisini onnur inntøka telur við so sum kapitalinntøka, húsaleiguinntøka o.a.

Fólkapensjónistur, ið hevur inntøkugrundarlag lægri enn 45.000 kr., fær fulla fólkapensjón. Markið á 45.000 kr. eitur frádráttarfría inntøkuupphæddin. Fólkapensjón lækkar stigvíst, tá inntøkan fer upp um frádráttarfríu inntøkuupphæddina.

Í gomlu pensjónsskipanini verður mótroknað soleiðis, at tá inntøkugrundarlagið fer upp um 45.000 kr., lækkar viðbótin við 20 % av inntøkuni, sum er hægri enn 45.000 kr. Grundupphæddin verður veitt uttan mun til inntøku.

Dømi 1
Um inntøkugrundarlagið er 50.000 kr., tá lækkar fólkapensjónin við 20 % av muninum millum 45 og 50.000 kr., svarandi til 1.000 kr. um árið. V.ø.o. ein fólkapensjónistur, sum tjenar 50.000 kr., missir 1.000 kr. av pensjónini um árið, svarandi til 83 kr. um mánaðin.

Dømi 2
Er inntøkugrundarlagið 100.000 kr., lækkar fólkapensjónin við 20 % av muninum millum 45 og 100.000 kr., svarandi til 11.000 kr. um árið.

Áðrenn 2020 var tað soleiðis, at inntøkan hjá hjúnum varð løgd saman, men samstundis varð frádráttarfría inntøkuupphæddin hjá hjúnum tvífaldað. Í 2020 bleiv tað broytt soleiðis, at tað bara er inntøkan hjá tí einstaka pensjónistinum, sum avger upphæddina, ið verður veitt í fólkapensjón. Tó kunnu hjún, har bæði hoyra til gomlu pensjónsskipanina, velja, at inntøkan hjá báðum verður løgd saman, og tá kunnu hjúnini tilsamans hava inntøku á 90.000 kr., áðrenn fólkapensjónin lækkar. Fyri nøkur hjún er tað ein fyrimunur, at inntøkan verður roknað saman – tað er treytað av, hvussu inntøkan er býtt millum hjúnafelagarnar

Í nýggju pensjónsskipanini verður mótroknað bæði í grundupphæddini og í viðbótini. Tá inntøkugrundarlagið fer upp um 45.000 kr., verður fyrst mótroknað við 20 % í grundupphæddini, og tá viðbótin er fult mótroknað, verður hildið fram at mótroknað við 25 % í viðbótini.

Í almenna og politiska kjakinum verður javnan ført fram, at tað lønar seg ikki hjá fólkapensjónistum at arbeiða, og at frádráttarfría inntøkuupphæddin tí eigur at hækka. Í hesum sambandi skal vísast á, at hjá teimum, sum hava inntøku hægri enn frádráttarfríu inntøkuupphæddina, ávirkar ein hækking ikki fíggjarliga insitamentið at arbeiða. Ein persónur, sum økir arbeiðsinntøkuna frá t.d. 100 til 150 tús. kr., fær neyvt tað sama burturúr meirinntøkuni, uttan mun til um frádráttarfría inntøkumarkið er 45, 60 ella 90 tús. kr. Effektivi markskatturin fyri inntøku hægri enn frádráttarfría inntøkuupphæddin broytist ikki, hóast frádráttarfría inntøkuupphæddin broytist.

Fólkapensjónin er sett saman av grundupphædd og viðbót. Fólkapensjónistur, ið hoyrir til gomlu pensjónsskipanina, og sum hevur lága inntøku, hevur eisini rætt til viðbót til ávísar pensjónistar (eisini nevnd brennistuðul). Harumframt hava allir pensjónistar eisini rætt til gjald frá Samhaldsfasta.

Gamla pensjónsskipanin: Inntøka í 2023 hjá fólkapensjónisti uttan aðra inntøku enn fólkapensjón og Samhaldsfasta

	Um árið		Um mánaðin		
	Ógift	*Gift*	*Ógift*	*Gift*	
Grundupphædd	51.684	41.076	4.307	3.423	Skattafrítt
Viðbót	46.752	37.584	3.896	3.132	Skattskyldugt
Viðbót til ávísar pensjónistar	7.860	3.930	655	328	Skattafrítt
Samhaldsfasti	72.840	72.840	6.070	6.070	Skattskyldugt
Inntøka áðrenn skatt	**179.136**	**155.430**	**14.928**	**12.953**	
Skattur og gjøld í alt	24.202	20.893	2.017	1.741	
Inntøka eftir skatt og gjøld	**154.934**	**134.537**	**12.911**	**11.211**	

Viðmerking: Landsskattur, miðal kommunuskattur og kirkjuskattur er drigin frá eins og gjald til Heilsutrygd og Kringvarp

Viðbót til ávísar pensjónistar er ikki tengd at frádráttarfríu inntøkuupphæddini. Viðbót til ávísar pensjónistar er reguleraða í serligari løgtingslóg, har tað er ásett, at veitingin dettur burtur, tá inntøkugrundarlagið hjá støkum er hægri enn 60.000 kr. Hjá giftum og samlivandi dettur veitingin burtur, tá inntøkugrundarlagið hjá báðum tilsamans er hægri enn 80.000 kr.

Nýggja pensjónsskipanin: Inntøka í 2023 hjá fólkapensjónisti uttan aðra inntøku enn fólkapensjón og Samhaldsfasta

	Um árið		Um mánaðin		
	Ógift	*Gift*	*Ógift*	*Gift*	
Grundupphædd	51.684	41.076	4.307	3.423	Skattafrítt
Viðbót	59.256	43.860	4.938	3.655	Skattskyldugt
Viðbót til ávísar pensjónistar	-	-	-	-	Skattafrítt
Samhaldsfasti	72.840	72.840	6.070	6.070	Skattskyldugt
Inntøka áðrenn skatt	**183.780**	**157.776**	**15.315**	**13.148**	
Skattur og gjøld í alt	28.747	23.184	2.396	1.932	
Inntøka eftir skatt og gjøld	**155.033**	**134.592**	**12.919**	**11.216**	

Viðmerking: Landsskattur, miðal kommunuskattur og kirkjuskattur er drigin frá eins og gjald til Heilsutrygd og Kringvarp

Um nøkur ár vera ógvuliga fáir fólkapensjónistar, sum einans fara at hava inntøkurnar í talvunum omanfyri. Allir løntakarar eru fevndir av løgtingslóg um eftirløn og spara upp egna pensjón. Undantikið fyritíðarpensjón eru allar almannaveitingar, sum koma í staðin fyri løn (t.v.s. dagpeningur vegna sjúku, lønarískoyti til tillagað starv o.a.) fevndar av løgtingslóg um eftirløn.

Fólkapensjónistar, ið hoyra til gomlu pensjónsskipanina, fáa grundupphæddina og útgjald frá Samhaldsfasta uttan mun til inntøkugrundarlag. T.v.s. at tað eru viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar, sum lækka ella detta burtur, tá inntøkugrundarlagið hækkar.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu høgt inntøkugrundarlagið skal vera, fyri at fólkapensjónin er fult mótroknað.

Inntøkugrundarlag, tá fólkapensjón er fult mótroknað

Gomul pensjónsskipan - ógift	278.760 kr.
Gomul pensjónsskipan - gift	232.920 kr.
Nýggj pensjónsskipan – ógift	540.444 kr.
Nýggj pensjónsskipan – gift	425.820 kr.

Talvan omanfyri vísir, hvussu høgt inntøkugrundarlagið skal vera, fyri at fólkapensjónin er fult mótroknað. Tað skal gerast vart við, at tá fólkapensjónin í gomlu skipanini er fult mótroknað, hevur pensjónisturin framhaldandi grundupphæddina eftir. Tá fólkapensjónin í nýggju skipanini er fult mótroknað, eru bæði grundupphædd og viðbót burtur.

Ein fólkapensjónistur á arbeiðsmarknaðinum hevur hægri inntøku enn starvsfelagin, sum ikki er fólkapensjónistur. Talvan niðanfyri vísir inntøku eftir skatt og gjøld hjá fólkapensjónistum, ið hava inntøku aftrat fólkapensjón og Samhaldsfasta.

Útgoldið um mánaðin eftir skatt og øll tvungin gjøld hjá fólkapensjónisti og løntakara

	Ógiftur		*Giftur*		*Løntakari (ikki-pensjónistur)*
Inntøku-grundarlag	*Gomul pensjón*	*Nýggj pensjón*	*Gomul pensjón*	*Nýggj pensjón*	*Arbeiðsløn*
5.000 kr./mdr.	15.932	15.850	14.232	14.146	3.880
10.000 kr./mdr.	17.821	17.959	16.450	16.327	6.880
15.000 kr./mdr.	20.210	19.890	18.875	18.250	9.819
20.000 kr./mdr.	22.555	21.650	21.290	22.070	12.736
25.000 kr./mdr.	24.927	23.327	24.043	22.028	15.425
30.000 kr./mdr.	27.608	25.317	26.725	24.038	17.987
35.000 kr./mdr.	30.290	27.328	29.405	26.050	20.425
40.000 kr./mdr.	32.970	29.339	32.086	28.663	22.863

Viðm.: Talvan tekur støði í, at inntøkugrundarlagið er antin arbeiðsinntøka ella pensjónsinntøka, ið er skattað við útgjald. Frameftir kemur forskattað pensjón at hava størri týdning, og tá verða upphæddirnar ikki tær somu sum í talvuni.

Fólkapensjónistar, sum hoyra til nýggju pensjónsskipanina, kunnu velja at útseta pensjónina og afturfyri fáa hægri pensjón seinni. Frádráttarfría inntøkuupphæddin ávirkar, nær tað lønar seg at útseta pensjónina. Ein hækking av frádráttarfríu inntøkuupphæddini merkir, at upphæddin fyri fulla mótrokning eisini hækkar. Tað eru 382 fólk, sum í løtuni hava útsetta pensjón.

1.3. Endamálið við uppskotinum


Endamálið er at hækka fólkapensjónina hjá pensjónistum, sum hava inntøkugrundarlag hægri enn 45.000 kr. Hetta verður gjørt við at hækka frádráttarfríu inntøkupphæddina úr 45.000 kr. upp til 61.900 kr. Hetta er upphæddin, sum var galdandi í 2019. 1. januar 2020 lækkaði upphæddin til 45.000 kr., samstundis sum fleiri aðrar broytingar vórðu gjørdar í pensjónsskipanini.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær, at frádráttarfría inntøkumarkið verður hækkað úr 45.000 kr. upp til 61.900 kr., sum er sama upphædd, ið var galdandi í 2019. Uppskotið hevur við sær, at flestu fólkapensjónistar, sum hava inntøku hægri enn 45.000 kr., fáa hægri fólkapensjón. Teir fólkapensjónistar, ið hava somikið høgt inntøkugrundarlag, at fólkapensjónin er fult mótroknað, fáa tó ikki ágóða av broytingini.

Myndin niðanfyri vísir, hvussu nógv fólkapensjónin fer at hækka um árið hjá fólkapensjónistum.

Fólkapensjón hækkar um árið



At frádráttarfría inntøkuupphæddin hækkar við 16.900 kr. hevur við sær, at upphæddirnar fyri fullari mótrokning eisini flyta seg við somu upphædd.

Inntøkugrundarlag, tá fólkapensjón er fult mótroknað

Frádráttarfrí inntøkuupphædd	***45.000 kr.***	***61.900 kr.***
Gomul pensjónsskipan - ógift	278.760 kr.	295.660 kr.
Gomul pensjónsskipan - gift	232.920 kr.	249.820 kr.
Nýggj pensjónsskipan – ógift	540.444 kr.	557.344 kr.
Nýggj pensjónsskipan – gift	425.820 kr.	442.720 kr.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er eitt fylgilógaruppskot til fíggjarlógaruppskotið fyri 2024, og tað hava ikki verið stundir at senda uppskotið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað vóru gott 800 fólkapensjónistar, ið hoyra til nýggju pensjónsskipanina, sum í 2022 høvdu inntøkugrundarlag hægri enn 45.000 kr. Meginparturin av teimum høvdu inntøkur millum 100 og 500 tús. kr., og hesi fara at fáa 3.000 til 4.000 kr. hægri fólkapensjón.

Tað vóru umleið 1780 fólkapensjónistar, sum hoyra til gomlu pensjónsskipanina, sum í 2022 høvdu inntøkugrundarlag hægri enn 45.000 kr. Av hesum eru umleið 1000, sum fara at fáa hægri viðbót – tey flestu fara at fáa 3.380 kr. meira um árið í fólkapensjón. Harumframt eru umleið 400 giftir pensjónistar, sum hava inntøkugrundarlag saman við hjúnafelaga. Tað ber ikki til við verandi hagtølum neyvt at siga, hvussu nógv av hesum fara at fáa hægri fólkapensjón, men sannlíkt er tað ein partur, ið fer at fáa hægri fólkapensjón.

Eisini eru umleið 600 fólkapensjónistar, sum hoyra til gomlu pensjónsskipanina, sum einans hava søkt um grundupphædd. Tey fáa sostatt onga viðbót, og alt annað líka fáa tey ikki ágóðan av broytingini í hesum uppskoti. Almannaverkið hevur ikki inntøkuupplýsingar hjá hesum pensjónistunum, og tað ber ikki til at siga, um onkur av hesum frameftir fer at fáa rætt til og søkja um viðbót.

Uppskotið hevur við sær, at útreiðslur landskassans til fólkapensjón fara at hækka við leysliga mett 6,5 mió. kr. á komandi fíggjarlóg. Fyrivarni skal takast fyri, at metingin byggir á inntøkur hjá fólkapensjónistum í 2022. Kostnaðurin fyri landskassan er hægri fyri pensjónistar í nýggju pensjónsskipanini. Í 2024 verður lutfallið millum nýggju og gomlu pensjónsskipanina broytt, umframt at talið av fólkapensjónistum økist ár undan ári. Tað merkir sostatt, at broytingin komandi árini fer at hava við sær hægri útreiðslur.

Metingin tekur ikki hædd fyri, at pensjónistar fara at steðga útsetanini og heldur velja at fáa fólkapensjón.

Metta meirútreiðslan omanfyri er bruttoupphædd. Veitingarnar, sum hækka, eru lutvíst skattskyldugar, og ein partur kemur sostatt aftur til land og kommunur. Fyri pensjónistar í gomlu pensjónsskipanini er tað skattskylduga viðbótin, ið hækkar. Hjá pensjónistum í nýggju pensjónsskipanini er tað fyrst skattafría grundupphæddin sum hækkar og síðani viðbótin. Umleið 30 % av mettu upphæddini í metingini koma innaftur í skatti – umleið helvt um helvt til ávikavist land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna og hevur ikki ávirkan á arbeiðsútboðið. At inntøkufría inntøkuupphæddin hækkar, ávirkar ikki fíggjarliga insitamentið hjá fólkapensjónistum at arbeiða, tí effektivi markskatturin hjá fólkapensjónistum við inntøku hægri enn 61.900 kr. verður óbroyttur. Tað er einans við inntøkum millum 45.000 kr. og upp til 61.900 kr., at hetta lógaruppskotið ávirkar markskattin.

Sambært hagtølum um inntøkur hjá fólkapensjónistum eru fáir fólkapensjónistar, sum hava inntøkugrundarlag beint undir 45.000 kr., og eisini fáir fólkapensjónistar hava inntøkugrundarlag millum 45.000 og 61.900 kr. Tað er onki í hagtølunum, sum bendir á, at fólkapensjónistar steðga við at arbeiða, tá teir røkka eini inntøku upp á 45.000 kr.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur við sær, at flestu fólkapensjónistar, ið hava inntøkugrundarlag hægri enn frádráttarfríu inntøkuupphæddina, fara at fáa hægri fólkapensjón. Fólkapensjónin fer at hækka soleiðis:

Gamla pensjónsskipanin

- Gift og ógift: inntøkugrundarlag frá 0 upp til 45.000 kr. = fólkapensjón hækkar 0 kr.
- Gift og ógift: inntøkugrundarlag frá 45.000 kr. upp til 61.900 kr. = fólkapensjón hækkar millum 0 og 3.380 kr. um árið
- Ógift: inntøkugrundarlag frá 61.900 kr. upp til umleið 300.000 kr. = fólkapensjón hækkar við upp til 3.380 kr. um árið
- Ógift: inntøkugrundarlag hægri enn umleið 300.000 kr. = fólkapensjón hækkar 0 kr.
- Gift: Inntøkugrundarlag frá 61.900 kr. upp til umleið 250.000 kr. = fólkapensjón hækkar upp til 3.380 kr. um árið
- Gift: inntøkugrundarlag hægri enn umleið 250.000 kr. = fólkapensjón hækkar 0 kr.

Nýggja pensjónsskipanin

- Gift og ógift: inntøkugrundarlag frá 0 upp til 45.000 kr. = fólkapensjón hækkar 0 kr.
- Gift og ógift: inntøkugrundarlag frá 45.000 kr. upp til 61.900 kr. = fólkapensjón hækkar millum 0 og 3.380 kr. um árið
- Ógift: inntøkugrundarlag frá 61.900 kr. upp til umleið 300.000 kr. = fólkapensjón hækkar 3.380 kr. um árið
- Ógift: inntøkugrundarlag frá umleið 300.000 kr. til umleið 550.000 kr. = fólkapensjón hækkar við upp til 4.225 kr. um árið
- Ógift: inntøkugrundarlag hægri enn umleið 550.000 kr. = fólkapensjón hækkar 0 kr.
- Gift: Inntøkugrundarlag frá 61.900 kr. upp til umleið 250.000 kr. = fólkapensjón hækkar 3.380 kr. um árið
- Gift: Inntøkugrundarlag frá umleið 250.000 kr. til umleið 440.000 kr. = fólkapensjón hækkar við upp til 4.225 um árið
- Gift: inntøkugrundarlag hægri enn umleið 440.000 kr. = fólkapensjón hækkar 0 kr.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at uppskotið er í andsøgn við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Frádráttarfría inntøkuupphæddin hækkar úr 45.000 kr. upp til 61.900 kr. Tað merkir, at fólkapensjónistur kann hava inntøkugrundarlag upp til 61.900 kr., áðrenn fólkapensjónin byrjar at lækka. Lógaruppskotið hevur ikki við sær aðrar broytingar, og sostatt verður inntøkugrundarlagið roknað á sama hátt sum við galdandi skipan.

Til § 2
Gildiskoma.

Pensjón er útgoldin forút, og tað merkir, at pensjón fyri januar verður útgoldin síðst í desember. Hendan lógin hevur virknað fyri útgjaldingina, ið verður framd síðst í desember 2023, sum er fyri januar 2024.

Almanna- og mentamálaráðið, 29. september 2023

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur